Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Hondbólts landsdystirnir:

Friggjakvøldið:

**Føroyar - Skotland** 41-17 (20-7)

*Málskjúttar:* Hans Áki Dal-Christiansen 8 (2), Finnur Hansson 6, Magnus Müller 5, Dánjal Tórgarð 5, Áki G. Olsen 4, Niklas Reginson 4, Joen Pauli Høgnesen 3, Rúni Fossdal 2, Bjarti Hansen 2, Tony Weihe 2, Andrias Nielsen 1

Leygarkvøldið:

**Føroyar - Írland** 35-16 (19-9)

*Málskjúttar:* Joen Pauli Høgnesen 7 (1), Bjarti Hansen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 4 (1), Finnur Hansson 4, Rógvi Sørensen 3, Dánjal Tórgarð 3, Tony Weihe 3, Rúni Fossdal 2, Andrias Nielsen 2, Áki G. Olsen 1

# Smurdu skotar og írar av

**HONDBÓLTUR** Manslandsliðið í hondbólti var nógv tað besta liðið í trílandakappingini, sum var í Dublin um vikuskiftið. Bæði ímóti Skotlandi og Írlandi gjørdist talan um sannførandi stórsigrar

Hilmar Jan Hansen

Fyrri dysturin var ímóti Skotlandi fríggjakvøldið, og hann var ikki serliga gamal, tá tað longu sást, hvønn veg tað bar. Hálvleiksstøðan var 20-7, og tá avtornaði, høvdu føroysku hondbóltsmenninir vunnið 41-17.

Sama lagið var í seinna dystinum, sum var leygarkvøldið ímóti írsku vertunum, tó at munurin á pappírinum var eitt sindur minni. Hesa ferð vóru Føroyar á odda 19-9 í hálvleikinum, og vunnu at enda 35-16.

– Vit vistu, at tað var avmarkað, hvussu stóra mótstøðu, vit skuldu vænta okkum. Kortini haldi eg, at bæði Skotland og Írland hava gjørt framstig, síðani vit spældu ímóti teimum í 2007 og vunnu uppaftur meira. Kanska eru skotarnir eitt sindur betur fyri enn írar, og teir vunnu eisini tann seinasta dystin teirra millum við fýra málum, sigur Dia Midjord, ið saman við Kára Nielsen er landsliðsvenjari.

### Blandaður hópur

Hópurin, teir báðir høvdu tikið út til ferðina í Dublin, fevndi um bæði ungar og eldri spælarar, so tað bar til hjá teimum at hava eina unga ketu inni viðhvørt og so eina eldri viðhvørt, umframt at liðið eisini var blandað, so teir yngru og eldru vóru saman um at manna liðið.

– Eg haldi, at vit spældu góðan hondbólt, hóast mótstøðan ikki var so øgilig. Vit koyrdu á alla tíðina, og írski hondbóltsformaðurin takkaði okkum eisini fyri, at vit ikki spardu okkum, men góvu bæði írum og skotum alla ta mótstøðu, teir kundu fáa. Og viðvíkjandi blandingini á liðnum, so stóðu teir yngru spælararnir hjá okkum einki aftan fyri teir eldru og royndaru, sigur Dia.

– Hetta er jú ein óvanlig støða fyri okkum, tí tað plaga at vera vit, ið spæla ímóti liðum, ið eru nógv betri enn vit. Tá spyrja fólk viðhvørt, hvussu tað ber til, at tey góðu liðini tíma at spæla ímóti okkum, men tað gera tey. Tí eiga vit heldur ikki at siga nei takk, tá vit fáa eina innbjóðing frá eitt nú Skotlandi og Írlandi, ið arbeiða við at menna sítt hondbóltsspæl.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Fingið sáttmála í Norra

**HONDBÓLTUR** Svein Rógvi Nielsen skiftir í næstum Stjørnuna út við norska felagið Ranheim Idrettslag, ið hann hevur gjørt trý ára sáttmála við. Fremsta uppgávan verður at byggja upp eitt U18-lið, so tað kann bjóða teimum stóru av í bestu deildini




*Venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, fer beint eftir páskir til Norra, har hann næstu trý árini skal byggja upp eitt nýtt U18-lið í felagnum Ranheim Idrettslag í Tróndheimi*

*Savnsmynd*

Hilmar Jan Hansen

Týsdagin 26. apríl byrjar venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, í einum nýggjum starvi yviri í Norra, har hann fyrst og fremst skal taka sær av U18-liðnum hjá Ranheim Idrettslag, sum er felag í Tróndheim-býarpartinum, Ranheim.

– Besta kvinnuliðið hjá felagnum spælir í triðbestu deildini, men teir satsa nógv upp á ungdómin og vilja hava meg at venja eitt nýtt U18-lið upp. Í Norra spæla U18-liðini í sokallaðu Spar-deildini, ið telur 14 tey bestu U18-liðini í Norra, greiðir Svein Rógvi frá.

– Tey størstu feløgini leggja nógv fyri, so tey kunnu vera umboðað í Spar-deildini, sum hevur nógva prestisju í sær. Júst nú hevur Ranheim Idrettslag tríggjar góðar U16-spælarar, sum eru á landsliðnum í sínum aldursbólki, og hesir tríggir spælararnir skulu líkasum vera stamman á einum nýggjum U18-liði, ið skal upp í Spar-deildina at bjóða teimum bestu av.

Talan er um ein trý ára sáttmála, og hetta fyrsta árið kemur Svein Rógvi eisini at vera knýttur at besta kvinnuliðnum hjá felagnum sum »manager«, so hann kemur at standa fyri ábyrgdini av spælarainnkeypum og øðrum viðurskiftum kring liðið.

### Størsta avbjóðing

– Eg má siga, at hetta persónliga er nógv tann størsta avbjóðingin, eg higartil havi havt sum venjari. Áður havi eg roynt meg í 1. deild niðri, í bæði Odense og Fredericia, men hetta er ein munandi størri avbjóðing, har mær verður litið til at byggja nakað upp frá grundini, sigur 37 ára gamli venjarin, sum í føroyskum hondbólti hevur vant bæði Stjørnuna, Neistan og Kyndil, umframt kvinnulandsliðið.

– Hetta er eitt felag, sum veruliga er til reiðar at satsa, so tí er hetta eitt sera spennandi starv at fara undir. Har eru einir 500 spælandi limir í felagnum, og hondbólturin har er á nokk so væl hægri stigi, enn vit kenna tað í Føroyum. Hetta er ein uppgáva, eg verliga gleði meg at fara undir.

Svein Rógvi er giftur við Anniku Ljósstein, ið bæði er kend frá Stjørnuni og landsliðnum, men hon fer í fyrsta umfari ikki við til Norra, tí hon júst hevur fingið nýtt starv á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum, men sum skilst eru innbygdir nakrir ferðaseðlar í sáttmálan hjá Svein Rógva, so Annika kann óivað byrja at venja seg til eina »sjómannakonutilveru«.

*hilmarjan@sosialurin.fo*